# Kilometrar av **shopping**




**Tað eru nógvir møguleikar at keypa klæði og annað í Keypmannahavn, men skalt tú hava alt í einum stað, samstundis, sum tú kanst parkera mann og børn, so er Field's loysnin**

**KEYPMANNAHAVN**

Hóast fólk bara tosa um fíggjarkreppu, mangul av peningi og so framvegis, so slepst ikki undan at børnini skulu hava okkurt nýtt, nú tey skulu byrja í barnagarði og skúla aftur. Maðurin hevur heldur ongantíð nakað at fara í tá hann skal vera hampiliga ílatin. Og nú tit eru í Danmark hóast alt, har alt er eitt lítið sindur bíligari, úrvalið 10 ferðir so stórt og so fært tú 20 prosent av peninginum aftur í tax-free, so tað er lítið annað at gera, enn at taka leiðina út á Ørestad.

Fyrstu løtuna inni í Field's mást tú helst hava mannin og børnini við, tey mugu avgreiðast beinanvegin, so tú sjálv sleppur at keypa okkurt eisini.

Tú skalt ikki ganga leingi, áðrenn tú hevur funnið handlarnar til mannin. Síðan er bara at peika, hvat hann skal hava og so at lata hann í hesi klæði. So er tað liðugt.

So koma børnini. Har er eisini nóg mikið í at velja, og tú hugsar um at keypa klæði til teirra eini 10 ár fram, men tú klárar at halda tær, tí okkurt skalt tú sjálv hava, og tað ber ikki til at hava mannin inni í Field's allan dagin. Ella, tað ber væl til.

Tí á ovastu hædd eru allar matstovurnar. Har kanst tú seta tey, børnini og mannin. Og tá tey ikki orka at eta meir, so er minigolf um vikuskiftini, og annars ber altíð til at vitja spælirúmið, har pápi og børn skjótt klára at brúka nakrar tímar.

Nú sleppur tú eisini sjálv í gongd. Hví ikki keypa jólagávuna, maðurin gloymdi í fjør? Ella bara eisini hana, hann skal geva tær í vetur. Tað skuldi verið lagamanni at funnið nóg mikið av øllum á teimum mongu kvadratkilometrunum av handlum.

Børnini og mannin skalt tú ikki hugsa um, tí verða tey troytt av støðunum uppi á loftinum, so eru eisini handlar, ið selja amboð, samstundis, sum tað altíð ber til at spæla nýggjastu spølini til xbox ella playstation onkustaðni í bygninginum.

Keyp bara, men minst til, at kuffertið í mesta lagi skal viga 20 kilo og at tað bara er loyvt at innflyta fyri eitt virði á 2.500 krónur fyri hvønn persón á ferðini í tax-free.

**Tað eru so nógvir handlar í Field's, at vitjast má fleiri ferðir, áðrenn tú nært allar**



**Einasti trupulleikin við Field's er, at alt líkist, so tað er skjótt at mistaka seg á hvørjari hædd ein er**



**Rímiliga væl goymt uppi á loftinum er eitt barnarúm, har øll familjan, men kanska serliga børnini kunnu hugna sær ófført**

Melda teg til Club Atlantic og
VINN FERÐASEÐLAR
og fá sertilboð sendandi við telduposti
Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.
Melda til á: www.atlantic.fo
Tel 34 10 00
ATLANTIC AIRWAYS
atlantic.fo